# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Valið er, um vit skulu hava ein forseta, sum kann leiða amerikanska fólkið ímóti ljósari tíðum*

*(Barrack Obama)*



*Stórsigurin í North Carolina var kanska tað avgerandi stigið hjá Barrack Obama*

*Mynd: Polfoto*



*Hillary Clinton hevur nógv at hugsa um, men hon vil ikki gevast*

*Mynd: Polfoto*

# Bara eitt undur kann bjarga Hillary Clinton

**Hillary Clinton vann tepurt í Indiana og tapti stórt í North Carolina, men hon er treisk og sýtir fyri at gevast**

Uppstillingarvalini í statunum Indiana og North Carolina síðstu nátt bøttu ikki um møguleikarnar hjá Hillary Clinton at gerast forsetavalevni hjá demokratunum og kanska fyrsta kvinnan í embætinum. Heldur tvørturímóti, siga hennara egnu ráðgevar.

Politiskir eygleiðarar í USA eru yvirhøvur á einum máli um, at aftan á úrslitini í Indiana og North Carolina verður tað trupult hjá tí endaliga uppstillingarfundinum hjá demokratiska flokkinum at gera annað enn at velja Barrack Obama til valevni í heyst. Tey bæði úrslitini í nátt hava við sær, at tann endaliga avgerðin liggur í hondunum á teimum sonevndu servalmonnunum, og eygleiðararnir halda, at hesir kunnu valla gera annað enn at velja Obama.

Amerikonsku fjølmiðlarnir vísa á, at Barrack Obama hevur prógvað, at hann er førur fyri at halda sær á beinunum, hóast tað leikar hart á. Í seinastuni hevur senatorurin úr Illinois verið fyri hørðum ágangi, sum serliga hevur verið um samband hansara við tann umstrídda prestin Jeremiah Wright. Men úrslitini í nátt vístu, at Obama hevur rist atfinningarnar av sær, og fleiri fjølmiðlar siga, at stórsigur hansara í North Carolina kann vera við til at avgera forsetavalið í novembur.

- Eg vann greiðan sigur í einum stati, sum bleiv sagdur at kunna fara báðar vegir, segði Obama í takkarrøðu síni í North Carolina í nátt, áðrenn hann ynskti Hillary Clinton tillukku við sigrinum í Indiana. Men tað var munur á sigrum. Í North Carolina vann Obama við 14 prosentstigum, meðan Hillary fekk tvey prosentstig meiri enn hann í Indiana.

Kanningar á valstøðunum vístu, at enn eina ferð vóru tað tey svørtu, sum gjørdu mun. Í North Carolina fekk Obama 91 prosent av teimum svørtu atkvøðunum.

### Ráðgevarnir ivast

Hillary Clinton takkaði í nátt fyri sigurin í Indiana, og hon gjørdi púra greitt, at hon hevur ongar ætlanir um at gevast, hóast sigurin har var tepur, og hóast hon tapti stórt í North Carolina. Samstundis nýtti hon høvi til at biðja veljararnar um fíggjarligan stuðul.

- Vit eru á veg ímóti Hvítu Húsunum við fullari ferð, men mær tørvar tykkara stuðul fyri at halda fram, segði hon.

Tey stóru bløðini The New York Times og Washington Post skriva í dag, at ráðgevarnir hjá Hillary Clinton ivast í, um tað er rætt av henni at halda fram við valstríðnum. Ein av ráðgevunum, sum vil vera ónevndur, sigur við The New York Times, at fleiri av stuðlunum hjá Hillary Clinton fara at biðja hana gevast, og hann væntar eisini, at tað verður torført hjá henni at savna meiri pengar til at halda fram.

- Vit taptu í februar, og síðani hevur tað verið mótbrekka. Nú tørvar okkum eitt undur, sigur ein av fremstu ráðgevunum við Washington Post.

## STUTT SAGT

### Vil hava eftirlit til Zimbabwe



*David Miliband er bretskur uttanríkisráðharri*
*Mynd: Polfoto*

Bretski uttanríkisráðharrin, David Miliband, heldur, at altjóða samfelagið eigur at senda fólk til Zimbabwe at halda eyga við seinna umfarinum av forsetavalinum, sum verður har. Miliband segði í gjár, at altjóða og óheft eftirlit er tað einasta, sum kann tryggja, at umvalið verður rættvíst, og at báðir partar kunnu viðurkenna úrslitið.

Forsetaval var í Zimbabwe tann 29. mars, men sambært almennu valnevndini fekk hvørki av valevnunum tey neyðugu 50 prosentini. Valnevndin sigur, at Morgan Tsvangirai hjá andstøðuni fekk 47,9 prosent, og at Robert Mugabe, forseti, fekk 43,2 prosent. Andstøðan vil ikki viðurkenna tað úrslitið og heldur uppá, at Tsvangirai fekk meiri enn 50 prosent av atkvøðunum. Ósemjan um úrslitið elvdi til ófrið, og minst tvey fólk eru deyð, og umleið 500 særd í samanbrestum.

### Harkalið avdúkað

Í Spania hevur løgreglan avdúkað eitt umfatandi brotsmannalið, sum hevur stolið dýrar bilar í fleiri evropeiskum londum. Undir einum átaki í býunum Madrid og Alicante kom løgreglan fram á 83 bilar av tí dýra slagnum, og 22 fólk vórðu handtikin. Tey flestu tiknu eru úr Bulgaria. Umframt bilarnar legði løgreglan hald á tvær skammbyrsur, 12.000 evrur, fleiri falsaðar nummarplátur, koyrikort og ymisk skjøl. Løgreglan heldur, at brotsmenninir hava selt teir dýru bilarnar í Spania og í londum í Eysturevropa, skrivar AP úr Madrid.